## Morten Olsen vil venja felag

Danski landsliðsvenjarin í fótbólti, Morten Olsen, er sinnaður at royna seg aftur sum venjara í einum felag. Síðani 2000 hevur Morten Olsen vant danska landsliðið, og hann hevur framvegis sáttmála við DBU. Men nú sigur Morten Olsen, at hann kundi væl hugsa sær at farið í eitt felag aftur at verið venjari. Áður hevur Morten Olsen vant eitt nú Brøndby, Ajax og Køln.



## Frem misti í yvirtíðini

Jónas Tór Næs og liðfelagarnir hava framvegis ikki vunnið nakran dyst í donsku 1. Deild hetta kappingarárið. Um vikuskiftið spældi Frem dyst nummar 9, og eina løtu líktist tað sigri til Frem. Tí felagið í Valby kom nevniliga á odda 2-0 seint í dystinum. Tá nakrir minuttir vóru eftir at spæla minkaði Brabrand um munin, og í yvirtíðini gjørdi Frem sjálvmál, og harvið endaði dysturin við javnleiki. Jónas Tór Næs spældi ikki við hesaferð.

## 07 Vestur-HB 2-3 (1-1):

# Venjing vestanfyri

07 Vestur

HB

**Í nógvar mátar avspeglaði seinasti landskappingardysturin í Sørvági á hesum sinni, at árið longu var mestsum liðugt. Men hóast regn og vind, fingu áskoðararnir fimm mál burturúr, tá meistararnir tóku steypið og vágamenn takkaðu fyri seg**



Staðfestingin varð gjørd longu seinasta vikuskiftið. Men hóast vind og regn var lagið á mongu HB-viðhaldsfólkunum framúr, tá proppurin varð skotin av champagnu-fløskunum

Mynd: Álvur Haraldsen



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Alt var avgjørt, áðrenn 07 Vestur og HB fóru á vøllin í Sørvági, so tí var spenningurin í sjálvum dystinum til at yvirskoða. Tað tóktist eisini í longum løtum, sum var hetta mest ein venjingardystur, men so skal eisini sigast, at liðini – umframt hvørtannað – høvdu vánaliga veðrið at stríðast við.

Vindur var alla tíðina, og haraftrat regnaði illa. Serliga í fyrra hálvleiki var eitt langt og grovt æl, ið gjørdi fortreytirnar fyri tí stóra spælinum mestsum fráverandi. Men báðir partar royndu, og fyri tað nógva var ikki tann stóri munurin at síggja á toppi og botni í fyrra hálvleiki.

Tó tóktist onkursvegna, sum hevði HB meira yvirskot og eina greiðari ætlan í sínum spæli, og tá fyrri hálvleikur var um at vera hálvliðin, komu meistararnir eisini á odda. Eitt HB-álop endaði við, at Johan Ejvind Restorff Mouritsen hegnisliga spældi útfrá til Milan Kuljic, ið var avgjørdur, tá hann sendi bóltin í málið.

Málið setti onkursvegna gongd í 07 Vestur, sum hevði einar tvær góðar royndir næstu løtuna, áðrenn fyrsta kortið fall í dystinum. Tamba Yarjah, ið fekk reytt fyri nærdyst ímóti Vagni Mohr Mortensen, tá liðini møttust í Havn fyrst í august mánaði, var ikki ordiliga komin yvir tað og sá aftur reytt.

Sum so ofta, so arbeiddu teir 10 hjá heimaliðnum bara tað meira, og tveir minuttir fyri steðgin fall útjavnandi málið, sum slett ikki var óuppiborið, hóast HB beint áðrenn hevði rakt stongina! Marcin Dawid fekk ikki hildið einum skoti, og so var Aco Pandurovic klárur á returinum og javnaði.

### Upp á 55 stig

Eftir tiltrongda steðgin í heita umklæðingarrúminum komu liðini so aftur á vøllin, og HB legði bragdliga fyri. Johan Ejvind fekk ein stóran møguleika, tá hann kom púra leysur ímóti Trygva Askham í 07 Vestur-málinum, ið tó fekk forðað fyri við einari frálíkari paradu, tá skotið kom.

Hesin kjansurin gav HB luft undir veingirnar, og bert fáar minuttir seinni bragdaði aftur, tá Rógvi Poulsen inni í brotsteiginum fekk eitt skump í ryggin. Brotssparkið setti liðformaðurin, Fróði Benjaminsen, trygt í netið, og HB var á veg ímóti teimum 55 stigunum at enda kappingina við.



Veteranurin á HB-liðnum, Hans á Lag, var fyrsti maður at fáa steypið, eftir at liðformaðurin, Fróði Benjaminsen, hevði lyft tað í loft

Mynd: Álvur Haraldsen

Kortini skuldu 07 Vestur enn eina ferð svara aftur. Hesa ferð eftir eitt hornaspark í høgru síðu, sum fyrst rakti ein HB-ara og síðani innskifta Hans á Lag, ið ikki fekk forðað fyri, at bólturin endaði í málinum. Eitt sjálvmál, hann tó bara kundi taka við einum skeivum smíli henda dagin…

Nú hendi so tað, at 07 Vestur fekk enn ein mann vístan av vølli, tá Morris Lewis tók munnin ov fullan og sá reytt, og við níggju spælarum bar ikki til at geva HB ta stóru mótstøðuna restina av dystinum. HB trillaði bóltin aftur og fram, sum best bar til, og fólk bíðaðu bara eftir triðja málinum.

Fleiri royndir vóru, men viðhvørt vantaði neyvleikin og viðhvørt kom Trygvi fyri við sínum góðu inntrivum. Men tá so Johan Ejvind fekk sín næsta frírennara, var hann munandi meira avgjørdur enn fyrru ferð, og Trygvi var uttan møguleika, tá Restorff Mouritsen-maðurin smekkaði á stongina og inn.

### Tvær stjørnur

Tað, sum eftir var av dystinum, var bert ein avgreiðsluspurningur, og tað sást á øllum brøgdum, at regnið og vindurin høvdu sett síni spor, tí menn gjørdust stívir í liðunum og fingu ikki so nógv at hanga saman á vøllinum.

Tá so seinasta bríkslið frá ársins dómara ljóðaði í Sørvági, tustu trúføstu HB-viðhaldsfólkini inn á vøllin til tað, tey høvdu bíðað eftir í smáar tveir tímar. Trunkin savnaðist mitt á vøllinum, har umboðini hjá Fótbóltssambandinum skuldu greiða dagsins og ársins setning.

Fyrst fór formaðurin í kappingarnevndini saman við aðalskrivaranum runt til HB-ararnar við gullheiðursmerkjunum, og síðani segði forsetin nøkur orð, áðrenn hann kundi handa liðformanninum hjá HB steypið, ið komandi árið sleppur at standa í væl fyltu steypaskápunum í Gundadali.

Fyri tjúgundu ferð fekk HB meistaraheitið formliga til høldar, og seinni um kvøldið var staðfest, at tað fer at síggjast aftur komandi kappingarár, tá meistararnir fara at spæla við tveimum stjørnum á bringuni – einari fyri hvørji 10 meistaraheiti…